## SETURSKÚLI Í SUÐUROY

Klokkan 06:45 fór bussurin. Vit vóru farin undir tann langa koyritúrin til Tórshavnar. Lagið var gott á bæði næmingum og lærarum, og spælt og sungið var. Smyril fór úr Tórshavn um 09:30 tíðina. Margretha og Anina kannaðu listan og tryggjaðu at øll vóru komin umborð. Siglingartúrurin var stuttur. Tá vit komu til Drelnes fóru vit í bussin, tí nú skuldi koyrast runt í Suðuroynni.



Stásiligi skúlin í Hovi.

Fyrst gekk leiðin til stásiliga skúlan í Hovi. Har fingu vit eina rundvísing og ein leskiligan døgurða, sum var eftirgjørd hara við baconsós, sera vælsmakkandi.



Síðani fóru vit undir ein langan busstúr.



Fyrst sóu vit vakra Vágseiði. Síðani hugtakandi Beinisvørð, og lendingina í Sumba. Aftaná fóru vit til Akraberg. Hóast nógva vindin, var tað ein sera hugtakandi túrur, ið setti Suðuroynna djúpt í okkara minni.





Krambúðin hjá Thomsen

So gekk leiðin inn til Tvøroyrar, har vit skuldu vitja einahandilin. Fyrst greiddi Anna Kirstin Thomsen sera gjølla og væl frá, hvussu tann sokallaða Krambúðin kom til, og hvussu hon virkar ídag. Síðani var ein lítil rundvísing á Seglloftinum. Aftaná rundvísingina kom tann parturin av túrinum vit øll vóru spent, og kanska summi bangin, uppá at uppliva. Anna Kirstin er framúr góður dansari, og sera lætt á føti. Hon lærdi okkum tveir dansihættir, og var hetta sera stuttligt og læruríkt. Tá ið vit vóru liðug at dansa var farið til borðs, har vit fingu eina sera vælsmakkandi máltíð, við eini øl ella sodavatn afturvið. Mett og væl sett, truvu vit aftur í dansin og settu bæði lendar, og heilan uppá prøvu. Vit lærdu ringdansin, sum er sera hátíðarligur og spennandi. Við Onnu Kirstin á odda, fingu vit eitt sera gott innlit í hvussu hesir ymsu dansirnir kunnu stimbra bæði vøddar og gott lag. Aftaná høvdu vit eina fríløtu, har vit gingu runt á seglloftinum, og í ungdómshúsinum. Summi fóru ein túr oman í pubbina, har smílandi barrvørurin veitti okkum eitthvørt tað vit bóðu um.



Hesar báðar syrgdu at túrurin var væltilrættislagdur og skipaður, so at alt gekk so lætt sum gjørligt.

Lagið á næmingum og lærarum var sera gott, tá farið var í bussin aftur og umborð á Smyril, har vit skuldu sova. Vit sungu í bussinum ávegis til Drelnes, og á Smyrli fingu vit eitt rúm har vit kundu syngja og hugna okkum.

Klokkan 08.55 legði Smyril at landi í Tórshavn. Smílandi komu vit øll úr skipinum, vælvitandi um at vit høvu verið á eini ferð, sum vit ikki fóru at gloyma. Vit fóru í bussin og Anina og Margretha, sum so ofta áður, kannaðu listan yvir næmingar. Síðani var farið heim. Ein sera væleydnaður seturskúli, har vit lærdu at handliskúlalívið kann verða áhugvert, læruríkt, spennandi og stuttligt alt í einum.